# FJØLMIÐLAFÓLK SKULU IKKI DØMAST FYRI **FORTÍÐINA**

**FJØLMIÐLAFÓLK** SKULU IKKI VERÐA DØMD FYRI SÍNA **FORTÍÐ**. MEN JOURNALISTAR SKULU HAVA **REINT MJØL** Í POSANUM, MEÐAN TEY STARVAST Í FJØLMIÐLAHEIMINUM. TAÐ SIGUR **ULRIK HAAGERUP**, SUM ER TÍÐINDALEIÐARI HJÁ **DANMARKS RADIO** Í KJALARVØRRINUM AV KJAKINUM, HVAT JOURNALISTAR KUNNU LOYVA SÆR AT SIGA Í **ALMENNA RÚMINUM**



**FJØLMIÐLAR**
**Uni Holm Johannesen**
uni@sosialurin.fo

Ulrik Haagerup er sannførdur.
- Fjølmiðlafólk hava ongan møguleika at vera uttanvelta, sigur hann. Orsøkin er einføld. Allir journalistar hava eina fortíð, sum onkursvegna heftir tey at journalistiskum málum. Ulrik Haagerup hevur greiða støðu í málinum. Fjølmiðlafólk eru menniskjur, eins og øll onnur. Menniskjur við kenslum og meiningum, hvussu samfelagið skal skipast.
Men hvar er markið hjá fjølmiðlafólki at geva sína persónligu áskoðan til kennar?
Kjakið um, hvat journalistar kunnu loyva sær at siga í almenna rúminum er kyknað aftur.
Bólturin fór av álvara á rull aftaná, at Heini í Skorini fyri tveimum vikum síðan langaði út eftir verandi samgongu og løgmanni í lesarabrævi. Heini í Skorini starvast í almenna Kringvarpinum, har hann leggur mentanarsendingina 'Refleksjón' til rættis. Men hvussu við Georg L. Petersen, sum var valevni hjá Sambandsflokkinum í 2008 og starvast sum blaðmaður hjá Dimmalætting? Vilmund Jacobsen, sum skrivar um føroysku fiskivinnuna í Sosialinum, og hevur áður stillað upp fyri Tjóðveldi? Hvussu við Barbaru Holm, sum er vertur í tíðindasendingini á Rás2 og hevur verið forkvinna í Unga Tjóðveldi? John William Joensen, blaðmaður, er formaður í Norðoya Sambandsfelag og Terji Nielsen, blaðmaður á Dimmalætting, var valevni hjá Fólkaflokkinum til býráðsvalið í Havn í 2004 – hvussu við teimum?
Tá hesi tíðindafólk hava havt tilknýti til ávísan politiskan flokk, kann spurningurin reisast, hvørt tey eru før fyri at gera óheftan journalistikk.
Ulrik Haagerup er tíðindaleiðari hjá DR. Hann hevur drúgvar royndir í fjølmiðlaheiminum, og hann hevur síni sjónarmið um neutralitet í journalistikki.

**Hugtakið neutralitetur – finnur tú tað í journalistikki?**
- Nei. Hvat er neutralitetur? Tað er einki sum eitur neutralur journalistikkur. Fjølmiðlarnir kring heimin taka støðu hvønn dag, tá teir varpa ljós á ymsar søgur og hendingar. Tá tú velur at skriva um eitt evni, er tín støða, sum neutralur miðil longu fokin. Fjølmiðlafólk eru eisini menniskju við kenslum, sum ótilvitað taka støðu í einstøkum málum. Tað slepst ikki undan. Sum dømi, tekur ein journalistur ikki undir við einari politiskari avgerð. Men hóast tað, so stendur hesin journalisturin og tosar við politikaran og skrivar um hesa avgerðina og málið.

**Hvar er markið hjá journalistinum?**
- Tað skal verða eitt krav, at journalisturin er ikki heftur at tí, sum hann viðger. Tað er púra burturvið, um tú er valevni hjá einum politiskum flokki og skrivar um politikk. Tá er títt trúvirði rokið. Tí skal tað verða eitt krav, at onnur ikki kunnu seta spurnartekin við trúðvirðið hjá journalistinum í einstaka málinum. Pápi tín skal helst ikki vera landssjúkrahússtjóri, meðan tú skrivar um landssjúkrahúsið. Uppgávan hjá journalistum er at royna sum frægast at síggja málið frá báðum síðum, meðan tú er óheftur. Tú skal vera objektivur og lýsa ymsu síðurnar í málinum.

**Men hvussu er trúvirðið, um fjølmiðlamaðurin langar út eftir samgonguni og viðger mentan? Kann ein jouralistur siga sína meining alment um ymisk viðurskifti, sum hann ikki viðgerð?**
- Nei, helst ikki. Fyrst og fremst, tí tú avmarkar títt arbeiðsøki munandi. Tað er ein trupulleiki, um blaðmaðurin bara kann skriva um mentan, tí fólk hava ikki álit á honum, tá hann skrivar um politikk, fiskivinnuna og annað. Lesarin hevur eina mynd av viðkomandi, um hann skrivar um politikk, og tað skaðar fjølmiðlamannin og arbeiðsplássið.

**Men hevur ein fjølmiðlamaður ikki talu- og skrivifrælsi?**
- Jú, sum privatpersónur. Men tað skaðar bara hansara trúvirði sum journalistur, og tað loysir seg ikki fyri nakran, um hann skrivar lesarabrøv um politisku støðuna ella annað.

**Tað eru bara gott og væl 50.000 fólk, sum búgva í Føroyum. Sleppa vit undan, at meiningarnar ikki verða almennar?**
- Tað er eingin grundgeving, at samfelagið er lítið. Fjølmiðlar, politikkur og vinnulív skal ikki verða samantvunnið. At føroyska samfelagið er so lítið, er fremsta orsøkin til at vera serliga varin við, hvat tú sigur og ikki.

**Men er munur á, um tú starvast á einum almennum miðli og einum privatum miðli?**
- Tú verður ongantíð neutralur. Fjølmiðlafólk eru menniskju, sum